# Løgmansskrivstovan

Dagfesting: 01.12.2021
Mál nr.: 21/17231
Málsviðgjørt: NF

**Fylgiskjal 1**

**Javntekstur**

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

| **Galdandi orðingar** | **Løgtingslógaruppskotið** |
|---|---|
| **Kapittul 24**<br>**Kynslig brotsverk** | **§ 1**<br><br>Í revsilógini, sambært lovbekendtgørelse nr. 215 af 24. juni 1939 om straffeloven, sum seinast broytt við løgtingslóg nr.45 frá 22. apríl 2021, verða gjørdar hesar broytingar:: |
| *Neyðtøka*<br><br>**§ 216.** Fyri neyðtøku verður tann revsaður við fongsli í upp til 8 ár, sum:<br>1) noyðir annan til samlegu við harðskapi ella hóttan um harðskap, ella<br>2) skaffar sær samlegu við at nýta annan ólógligan tvingsil, sambært § 260, ella skaffar sær samlegu, har tann óræ ttaði er í slíkum tilstandi ella slíkari støðu, at viðkomandi ikki er førur fyri at seta seg upp ímóti gerðini. | **1.** § 216, stk. 1 verður strikað og í staðin verður sett:<br>"Fyri neyðtøku verður tann revsaður við fongsli í upp til 8 ár, sum hevur samlegu við persón, ið ikki samtykkir til tað.<br>*Stk. 2.* Fyri at samtykki skal vera hildið at vera sjálvboðið, skal hetta vera komið vera komið til sjóndar við orðum ella gerðum ella síggjast í tí ítøkiligu støðuni og høpinum. Tað er ikki sjálvboðið, um gerningsmaðurin hevur noytt annan til samlegu við harðskapi ella hóttan um harðskap. Tað er heldur ikki sjálvboðið, um gerningsmaðurin hevur skaffað sær samlegu við at nýta annan ólógligan |

| | |
|---|---|
| *Stk. 2.* Fyri neyðtøku verður tann, sum hevur samlegu við barn undir 12 ár, revsaður við fongsli í upp til 12 ár.<br>*Stk. 3.* Revsingin eftir stk. 1 kann vaksa upp í 12 ár, um neyðtøkan hevur verið serliga vandamikil, ella umstøðurnar aðramáta eru serliga skerpandi.<br>*Stk. 4.* Tá ið revsingin verður ásett, skulu umstøðurnar vanliga roknast sum skerpandi, um tann órættaði hevur verið fyri menniskjahandli. | tvingsil, sambært § 260, ella hevur skaffað sær samlegu við persón, sum er í slíkum tilstandi ella slíkari støðu, at viðkomandi ikki er førur fyri at seta seg upp ímóti gerðini."<br>Stk. 2-4 verður eftir hetta stk. 3-5.<br><br>**2.** Í § 216 verður aftan á stk. 3, sum verður stk. 4, sum nýtt stk. sett:<br>"*Stk. 4.* Tá ið revsingin verður ásett skal dentur leggjast á ta serligu skemd, ið brotsverkið hevur við sær."<br>Stk. 4, sum verður stk. 5, verður eftir hetta stk. 6. |
| *Kynslig misnýtsla av børnum*<br><br>**§ 222.** Tann, sum hevur samlegu við barn undir 15 ár, verður dømdur í fongsul í upp til 8 ár, um ikki talan er um brot á § 216, stk. 2.<br>*Stk. 2.* Tá ið revsingin verður ásett, skulu umstøðurnar roknast sum skerpandi, um gerningsmaðurin hevur skaffað sær samlegu við at gera sær dælt av síni kropsligu ella sálarligu yvirvág.<br>*Stk. 3.* Hevur gerningsmaðurin skaffað sær samlegu við tvingsli ella við hóttanum, kann revsingin vaksa upp í 12 ár. | **3.** *§ 222, stk. 3* verður til § 222, stk. 2 og *§ 222, stk. 2* verður til § 222, stk. 3.<br><br>**4.** Í *§ 222, stk. 3,* sum verður stk. 2, verður aftan á "við" sett: "at gera sær dælt av síni kropsligu ella sálarligu yvirvág og við brúk av".<br><br>**5.** Í *§ 222, stk. 3*, sum verður stk. 2, verður aftan á "við" sett: "at gera sær dælt av síni kropsligu ella sálarligu yvirvág ella við brúk av". |
| **§ 228.** Brot á § 216, stk. 1, nr. 2, §§ 218 ella 222-224, § 225 sambært § 216, stk. 1, nr. 2, §§ 218 ella 222-224, § 226 ella § 227, stk. 1, verða lutvíst linari revsað, um gerningsmaðurin av ókunnleika um tilstandin ella aldurin hjá tí órættaða ikki kann sigast at hava handlað tilætlað, men tó í ósketni. | **6.** Í *§ 228* verður "§ 216, stk. 1, nr. 2," strikað í tveimum førum. |

| | |
|---|---|
| *Blúnisbrot*<br><br>**§ 232.** Tann, sum fremur blúnisbrot, verður revsaður við sekt ella fongsli í upp til 2 ár. Er tann órættaði undir 15 ár, er revsingin sekt ella fongsul í upp til 4 ár. | **7.** Í *§ 232* verður sum stk. 2 sett:<br>"*Stk. 2.* Tá ið revsingin verður ásett skal dentur leggjast á ta serligu skemd, ið brotsverkið hevur við sær." |
| *Dómsviðurskifti*<br><br>**§ 236 a.** Tá ið dømt verður eftir §§ 216 ella 222, § 223, stk. 2, § 224, stk. 1, § 225 sambært §§ 216 ella 222, § 223, stk. 2, ella § 224, stk. 1, § 228 sambært eini av áðurnevndu ásetingum, § 232 ella § 262 a, stk. 2, kann tann dømdi saman við dóminum fáa hesi forboð:<br>1) tilhaldsforboð, sum er forboð fyri at vera ella ferðast á einum neyvari ásettum øki við gerningsstaðið,<br>2) bústaðarforboð, sum er forboð fyri, uttan við loyvi frá løgregluni, at lata børn undir 18 ár halda til á bústaði sínum ella sjálvur at halda til hjá persónum, har sum børn undir 18 ár búgva,<br>3) vitjanarforboð, sum er forboð fyri at fáa vitjan av børnum undir 18 ár, tá ið ein vaksin ikki er við, ella<br>4) kontaktforboð, sum er forboð fyri gjøgnum internetið ella tílíka skipan til at breiða út upplýsingar at royna at fáa samband við børn undir 18 ár, ið ikki kenna tann dømda.<br>*Stk. 2.* Forboð eftir stk. 1 fevnir ikki um samband, tilhald ella ferðing, sum tann dømdi av serligum orsøkum má metast at hava rætt til. Forboð eftir stk. 1, nr. 2 og 3 fevnir ikki um børn ella ættleidd børn hjá viðkomandi.<br>*Stk. 3.* Forboð kann verða givið, tá ið tað eftir slagnum á lógarbrotinum og eftir upplýsingum um tann dømda, herímillum um áður framdan kriminalitet, má metast at vera nærliggjandi vandi fyri, at tann dømdi annars fer at gera líknandi lógarbrot, og forboðið kann vera við til at fyribyrgja hesum vanda. | **8.** Í § 236 a, stk. 1, nr. 1, verður "einum neyvari ásettum øki við gerningsstaðið" broytt til: "neyvari ásettum økjum, har tað er vandi fyri, at viðkomandi fer at gera nýggj lógarbrot av sama slagi".<br><br>**9.** Í § 236 a, stk. 3 verður "nærliggjandi" strikað. |

| | |
|---|---|
| *Stk. 4.* Forboð verður sett at galda í 1 til 5 ár, frá tí at endaligur dómur er sagdur, ella tað verður sett at galda í óásetta tíð.<br>*Stk. 5.* Forboð má ikki vera í misjavna við tað ólag, sum tað skapar hjá tí dømda, við fyrilitið fyri teimum, sum tað skal verja, ella við slagið á lógarbrotinum.<br>*Stk. 6.* Tá ið forboð er sett at galda í óásetta tíð, kann tann dømdi aftan á 5 ár, roknað frá endaliga dóminum, krevja, at ákærumyndugleikin biður rættin taka støðu til, um forboðið skal standa við. Um serligar umstøður tala fyri tí, kann løgmálaráðharrin loyva, at málið verður lagt fyri rættin áðrenn hetta. § 59, stk. 2 er samsvarandi galdandi. Avgerðin verður tikin við úrskurði. Verður avgjørt, at forboðið heilt ella lutvíst skal standa við, kann tað leggjast fyri rættin av nýggjum, tó ikki fyrr enn 2 ár eru gingin. | **10.** § 236 a, stk. 4, verður orðað soleiðis:<br>“Forboð verður sett at galda í óásetta tíð. Forboð kann tó verða sett at galda í 1 til 5 ár, frá tí at endaligur dómur er sagdur.” |
| *Stk. 7.* Brot á forboð eftir stk. 1 verður revsað við fongsli í upp til 4 mánaðir. | **11.** Í § 236 a, stk. 7, verður “4 mánaðir” broytt til: “2 ár”. |